## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 10 og 14 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, týsdagin minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 10 og 14 stig.

Kappingarráðið:

# Boðar aftur SEV á fund

**Eftir at SEV eisini í Eystara Landsrætti varð dømt at tapa sakina móti Kappingarráðnum, fer ráðið at seta seg í samband við el-felagsskapin um nýggjar samráðingar um el-prísirnar.**

PRÍSÁSETING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Nú dómur er fallin í Landsrættinum, ætlar Terje Sigurðsson í Kappingarráðnum, at taka málið upp aftur og seta seg í samband við SEV um prísirnar.*

*Savnsmynd*

Tá Kapingarráðið fyri einum fýra árum síðani fór at hyggja nærri at prísunum hjá SEV, trúði væl eingin, at so drúgv tíð og so mikið stríð skuldi standast av hesum.

Eftir innleiðandi samráðingar vildi SEV ikki góðtaka ræ ttin hjá Kappingarráðnum at »blanda seg uppí« prísásetingina hjá elfelagsskapinum. Og eftir eina togan aftur og fram endaði málið umvegis kærustovninum tískil í rættinum. Har fekk Kappingarráðið viðhald við tí úrsliti, at SEV kærdi dómin inn fyri Eystara Landsrætt. Hesin hevur nú viðgjørt málið og hevur staðfest dómin í Føroya Rætti. Sambært Leivi Hansen í útvarpinum í síðstu viku er lítið sannlíkt, at SEV fer víðari í Hægsta Rætt við málinum.

Málið snúði seg í stuttum um, at Kappingarráðið metti, at prísurin á kilowatttímunum hjá SEV vóru órímiliga høgir – meiri nágreiniliga 18 oyru pluss mvg ov høgir – og tí vildi ráðið hava SEV at lækka prísirnar tilsvarandi. Men sum nevnt vildi SEV ikki hava Kappingarráðið at blanda seg í teirra prísáseting.

### Nýggjar samráðingar

Terje Sigurðsson, leiðari á stovninum, sigur, at nú úrskurðurin í Eystara Landsrætti fyriliggur, ætla teir at seta seg í samband við SEV aftur til tess at fáa samráðingar í gongd um prísirnar.

-Tað verður sjálvandi neyðugt at endurskoða grundarlagið fyri prísásetingini. Tað eru jú gingin fýra ár, síðani vit mettu um prísstøðið í granalondunum og hvussu eitt nú oljuprísirnir ávirka viðurskiftini hjá SEV, so grundarlagið kann vera broytt, vísir Terje Sigurðsson á.

Tað er § 11 í kappingarlógini, ið liggur sum grundarlag fyri heimildini hjá Kappingarráðnum at áseta prísir.

- Vit royna altíð við samráðingum at fáa ásett prísirnar, og í allarflestu førum eydnast tað eisini í sátt og semju. Men vit hava eisini heimild til at áleggja fyritøkum prísirnar, um eingin semja fæst, sigur Terje Sigurðsson.

Hann vísir á, at arbeiðið hjá Kappingarráðnum er altíð framatrættað soleiðis at skilja, at tað sum er farið er farið, og tað hvørki vilja ella fáa teir gjørt nakað við. Og hóast ein nýggj kappingarlóg er um at verða samtykt í løgtinginum, ein sonevnd forboðslóg, i gevur ráðnum enn hvassari amboð at arbeiða við, so er grundsjónarmiðið um samráðingar ikki broytt.

So tað verður í hvussu er í fyrsta umfari gjøgnum samráðingar, at kilowattprísirnir hjá SEV verða broyttir – um teir altso skulu broytast.

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -4 |
| Nuuk | -3 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | -1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 8 |
| Seyðisfjørður | 3 |
| Tórshavn | 7 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 17 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | --- |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 8 |
| Helsinki | 7 |
| Moskva | 3 |
| Berlin | 9 |
| Warzawa | 9 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 13 |
| Paris | 19 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 20 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 21 |
| Beijing | 19 |
| New Dehli | 36 |
| Bangkok | 36 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 21 |
| New York | 22 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | -- |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 995 hPa. norðan fyri Føroyar fer í landnyrðing. Eitt hátrýst, 1022 hPa. yvir Írlandi fer í landnyrðing og mennist.




**Í dag:**
Hátrýstið yvir Norðsjónum stendur mestsum í stað og gevur góðveður á okkara leiðum komandi dagarnar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 21/4 kl. 06⁰⁰ – 22/4. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,6°
Minsti hiti máldur í apríl: -9,9° - Mesti hiti máldur í apríl: 18,3°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 8,0 mm – mált frá 21/4 kl. 06⁰⁰– 22/4 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í apríl: 123,0 mm





**Tiltøk í Miðlahúsinum í apríl**



- altíð eitt tiltak miðlahúsinum

leygardagin 28. apríl
**Aglow**

mánadagin 30. apríl
**Javni**


## VESTFALLSKYRRINDI

24. apríl — Fyrra kvarter
30. apríl — Mánin longst frá jørðini
2. mai — Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2007

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 25. Apr. | 02.24 | 15.00 | 01.24 | 14.00 | 01.39 | 14.15 | 04.24 | 17.00 | 05.24 | 18.00 | 00.39 | 13.15 | - | 12.15 | 02.39 | 15.15 | 03.39 | 16.15 | 02.09 | 14.45 | 03.24 | 16.00 |
| 26. Apr. | 03.36 | 15.57 | 02.36 | 14.57 | 02.51 | 15.12 | 05.36 | 17.57 | 06.36 | 18.57 | 01.51 | 14.12 | 00.51 | 13.12 | 03.51 | 16.12 | 04.51 | 17.12 | 03.21 | 15.42 | 04.36 | 16.57 |
| 27. Apr. | 04.18 | 16.38 | 03.18 | 15.38 | 03.33 | 15.53 | 06.18 | 18.38 | 07.18 | 19.38 | 02.33 | 14.53 | 01.33 | 13.53 | 04.33 | 16.53 | 05.33 | 17.53 | 04.03 | 16.23 | 05.18 | 17.38 |
| 28. Apr. | 04.58 | 17.16 | 03.58 | 16.16 | 04.13 | 16.31 | 06.58 | 19.16 | 07.58 | 20.16 | 03.13 | 15.31 | 02.13 | 14.31 | 05.13 | 17.31 | 06.13 | 18.31 | 04.43 | 17.01 | 05.58 | 18.16 |
| 29. Apr. | 05.35 | 17.53 | 04.35 | 16.53 | 04.50 | 17.08 | 07.35 | 19.53 | 08.35 | 20.53 | 03.50 | 16.08 | 02.50 | 15.08 | 05.50 | 18.08 | 06.50 | 19.08 | 05.20 | 17.38 | 06.35 | 18.53 |